# Frítíðarískoytið verður tíðaravmarkað

Frá 1. januar í 2026 er tann broytingin gjørd, at nú verður frítíðarískoytið tíðaravmarkað í mánaðarroknskapinum.

**Hvussu hevur verið gjørt higartil?**

Higartil hevur frítíðarískoytið ikki verið tíðaravmarkað, hóast ársendi fyri flestu sáttmálarnar er mitt í frítíðarárinum. Fyri allarflestu sáttmálar verður frítíðarískoytið roknað av lønini, sum er goldin frá 1. apríl í árinum fyri til 31. mars í árinum, tá ið frítíðarískoytið verður útgoldið. Tað merkir, at hevur stovnurin t.d. 12 mió. kr. í útreiðslum til frítíðarískoyti, so eru 9/12 av hesi skylduni íkomnir árið fyri.

Roknskaparkunngerðin sigur, at skyldan skal verða tikin við í tí árinum, sum hon stavar frá.

**Hví broyta?**

Verandi mannagongd er serliga óheppin, tá ið starvsfólk fara úr starvi, ella tá ið stovnsnummur verða broytt ella niðurløgd.

Tá ið starvsfólk fer úr starvi, er tørvur á at gera skylduna upp og bóka hana. Fer starvsfólkið úr starvi millum 1. apríl og ársenda, verður skyldan ikki bókað fyrr enn árið eftir.

Tað kemur meiri enn so fyri, at stovnsnummur verða broytt ella niðurløgd. Serliga verður tað gjørt um eitt ársskifti. Tá ið so frítíðarískoytið skal avgreiðast í apríl árið eftir, so verður tað bókað á gamla stovnsnummarið. Gamla stovnsnummarið hevur onga játtan tá, og tí ber tað í sær bæði fløkjur og eyka arbeiði.

Samanumtikið kann sigast, at tað er ein trupulleiki at arbeiða við eini skyldu, sum ikki verður skrásett, fyrr enn hon kemur til útgjaldingar.

**Hvør er broytingin?**

Broytingin er, at nú verður skyldan bókað so hvørt, sum hon fellur. Tá ið lønin fyri januar í 2026 varð avgreidd, varð frítíðarískoytið fyri januar eisini tikið við sum ein lønarútreiðsla í rakstrinum.

Lønmóttakarin merkir ongan mun, og frítíðarískoytið verður útgoldið sum vant saman við mánaðarlønini í apríl. Tá verður bert skyldan fyri apríl bókað.

**Hvussu so við skylduni, sum er innvunnin í 2025 og verður goldin út í apríl í 2026?**

Síðst í apríl mánaði verður frítíðarískoytið útgoldið, sum starvsfólkini hava innvunnið. Stórur partur av tí er innvunnin í 2025.

Stovnarnir fara einki at merkja til tann partin, sum stavar frá 2025, tí hann kemur als ikki við í raksturin hjá stovnunum. Peningurin verður tikin við sum skuld á fíggjarstøðuni hjá Gjaldstovuni. Tá ið útgjaldsdagurin fyri innvunnu skylduna í 2025 so kemur, flytur Gjaldstovan pengarnar av síni fíggjarstøðu og ikki av rakstrinum hjá stovnunum, sum í dag.

Á roknskaparmáli er talan um broyting í roknskaparmeginreglum. Farið verður frá kontant- til innvinningarmeginregluna.

Fyri at stovnarnir í skiftinum í 2026 ikki skulu tyngjast tvífalt, ger Gjaldstovan nakrar tøkniligar javningar, sum Gjaldstovan er heimilað at gera. Stovnarnir fara tí einki at merkja til hetta skiftið.

Tá ið 2026 er runnið, verður endaúrslitið fyri stovnarnar - um ikki 100% tað sama - nøkulunda tað sama, hvørt tað var kontant- ella innvinningarmeginreglan, sum brúkt varð fyri at avgreiða frítíðaríksoytið. Stóri munurin fyri stovnarnar er, at nú verður ikki nakað lop í lønini í apríl. Nú verður frítíðaríkoytisskyldan javnað yvir árið.

**Hvar sæst útreiðslan fyri frítíðaríkoytið?**

Frítíðaríkoytið sæst í Lønarkunningini, millum annað í yvirlitinum sum eitur útgjøld.

Tað sæst eisini í Leiðslukunning, tá ið undir standardskontu 11 Lønir verður borað niður á útgreining.

Á næstu síðunum er gjøllari greitt frá tí.

## Finn frítíðaríksoytið í Lønarkunninigini

Í Lønarkunninigini er í ovara høgra horni yvirlit við útgjøldum.

**Útgjøld** • januar 2026

| Upphædd | Upphædd |
|---|---|
| Fastar lønir | 2.940.710 |
| Tímar o.a. | 30.911 |
| Skattafríar veitingar | 63 |
| Frítíðargjøld | 47.371 |
| Eftirlønargjøld | 388.889 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 136.325 |
| **Tilsamans** | **3.544.270** |
| Eftirhildið | −18.990 |

Verður trýst á heilt uppi í høgra horni, sæst yvirlitið meiri útgreinað:

Vel stovn/deild ... 2022 2023 2024 2025 2026

Mánaðarlig útgjøld í 2026

Vel sáttmála ... Lønarbólkar Lønarsløg Løn og barsil Bara løn Bara barsil

| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des | Til samans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fastar lønir | 2.940.710 | 2.942.491 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.883.202 |
| Tímar o.a. | 30.911 | 31.997 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 62.908 |
| Skattafríar veitingar | 63 | 1.433 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1.496 |
| Frítíðargjøld | 47.371 | 47.994 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 95.365 |
| Eftirlønargjøld | 388.889 | 382.330 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 771.219 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 136.325 | 136.431 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 272.756 |
| **Til samans** | **3.544.270** | **3.542.676** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **7.086.946** |
| Eftirhildið | −18.990 | −26.866 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | −45.856 |

Frítíðaríksoytið er í tí bólkinum, sum eitur **Frítíðargjøld**.

| | Jan | Feb | Mar | Apr |
|---|---|---|---|---|
| Fastar lønir | 2.940.710 | 2.942.491 | 0 | 0 |
| Tímar o.a. | 30.911 | 31.997 | 0 | 0 |
| Skattafríar veitingar | 63 | 1.433 | 0 | 0 |
| Frítíðargjøld | 47.371 | 47.994 | 0 | 0 |
| 7110 Roknað frítíðaríksoyti | 43.662 | 43.481 | 0 | 0 |
| 7111 Frítíðarløn í grunn | 3.709 | 4.513 | 0 | 0 |

Í lønarslagnum, sum eitur **7110 Roknað frítíðaríksoyti**, er upphæddin skrásett.

Verður trýst á sjálva linjuna **7110 Roknað frítíðaríkskoyti**, koma nøvnini á starvsfólkunum fram, og har sæst, hvussu stórt roknaða frítíðaríkskoytið hjá hvørjum einstøkum starvsfólki er, mánað fyri mánað.

Tað ber eisini til at síggja upphæddina í lønarkoyringini og bókingini.

---

Í lønarkoyringini og útgjaldinum hjá einstaka starvsfólkinum ber eisini til at finna upphæddina.

## Finn frítíðarískoytið í Leiðslukunningini

Í R&J-yvirlitinum skal roknskapardømið vera **Landskassaroknskapardømi** og í ‘stjørnu’-teiginum skal standa **standardkonta**.




Út fyri lønir (høgru megin) ber so til at bora niður og útgreina eftir **Útgr**.




Frítíðarískoytið er á kontu xx30. Til ber at velja tær konturnar, um trýst verður á pílin í ‘stjørnu’-teiginum og síðan trýsta á ‘**Vel ávís virði fyri útgreining’**.



Henda talvan kemur so fram, og nú ber til at seta flugubein í teigarnar, sum enda við 30.




Og so sær endaliga talvan soleiðis út:




| StRk | Útgreining | Heiti StRk | Heiti Útgreining | | Salda 01-2026 | Sal 02-202 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1110 | 0430 | Mánaðarlønt | Frítíðarískoyti/frítíðarløn - Tænastumannalíknandi K | | 1.649,64 | 1.649, |
| 1110 | 0530 | Mánaðarlønt | Frítíðarískoyti/frítíðarløn - Starvsmenn K | | 12.349,33 | 12.349, |
| 1110 | 1530 | Mánaðarlønt | Frítíðarískoyti/frítíðarløn - Akademikarar K | | 2.415,38 | 2.415, |
| 1110 | 1930 | Mánaðarlønt | Frítíðarískoyti/frítíðarløn - Búskapar- & Løgfrøðingar K | | 4.918,32 | 4.918, |
| 1111 | 0430 | Tænastumenn | Frítíðarískoyti/frítíðarløn - Tænastumenn K | | 2.689,84 | 2.689, |
| 1112 | 0530 | Tímalønt | Frítíðarískoyti/frítíðarløn - Starvsmenn K | | 2.445,58 | 2.445, |
| | | Tilsamans | | | 26.468,09 | 26.468,( |